Bilar eru ikki at spæla við. Nógv ferð í ferðsluni kann kosta álvarsamt. Stendur tað til nýggju forkvinnuna í Ráðnum fyri ferðslutrygd skulu fólk hugsað um hetta hvørja ferð, koyrt verður

Sjónligari ferðslutrygd

Nýggi formaðurin í Ráðnum fyri ferðslutrygd ynskir at gera ráðið og ferðslutrygd meira sjónligt í Føroyum. Arbeitt verður eisini við at fáa gjørt eina spildurnýggja ferðslulóg

FERÐSLUTRYGD
Heri á Rógvi

Á aðalfundinum hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd varð Rúna Sivertsen úr Klaksvík vald til nýggjan formann fyri Petur Jacob Sigvardsen.

Og nýggja forkvinnan ætlar at fara til arbeiðis beinanvegin.

– Við skulu hugsa um, at bilar eru vandamiklar maskinur, sum kunnu drepa og vera til álvarsaman skaða. Hetta mugu vit hugsa um hvørja ferð, vit seta okkum í ein bil, sigur nýggja forkvinnan í Ráðnum fyri ferðslutrygd, Rúna Sivertsen.

Nýggi formaðurin er heldur ikki í iva um, at tað er neyðugt at gerast meiri sjónlig fyri ferðslutrygd og við boðskapinum. Og hetta gerst best við at samstarva við fjølmiðlarnar, heldur Rúna.

– Vit skulu duga at brúka fjølmiðlnar fyri at gerast meiri sjónlig. Endamálið er at fáa hugburðin hjá fólki at broytast, og hetta gerst best umvegis fjølmiðlnarnar, sigur Rúna Sivertsen.

Sjálv hevur Rúna sitið á tingi í samfull fýra fyri Fólkaflokkin, og hon roknar eisini við, at hetta er ein orsøkunum til, at heitt varð á hana um at gerast forkvinna fyri ráðið.

– Tað varð heitt á meg um at gerast formaður, og eg tók av. Eg veit ikki rættiliga, hví tað var, men eg kenni tað politiska skipanina innanífrá, og eg havi góðar møguleikar at gera meg galdandi har, sigur Rúna Sivertsen.

At arbeiða við landsmyndugleikunum verður uttan iva eisini ein stórur partur av arbeiðinum hjá nýggja formanninum, tí ráðið hevur stórar ætlanir, m.a. við Null-hugsjónini. Men Ráðið fyri ferðslutrygd ynskir eisini at fáa gjørda eina heilt nýggja ferðslulóg.

– Vit hava ein gamla ferðslulóg sum er, og hana hava myngudleikarnir hampa upp á nakrar ferðir, men hetta er ikki nóg gott. Tíðirnar eru so nógv broyttar, at vit í Føroyum tørva eina heilt nýggja ferðslulóg, sum verður gjørd frá botni av, sigur Rúna Sivertsen.

Null hugsjón

Ráðið fyri ferðslutrygd hevur eisini latið úr hondum eitt álit, kallað Ávegis til Null-hugsjónina.

Null-hugsjónin byrjaði í Svoríki, og aðalmálið er skipa soleiðis fyri, at ongin doyr ella kemur illa til skaða í ferðsluni.

Lógir og ásetingar skulu so byggjast upp eftir hesum prinsippi.

Sjálvt álitið er eitt katalog við hugskotum, siga tey hjá ferðslutrygd. Hugt verður eftir øllum í samband við ferðslu og komið verður við hugskotum til, hvussu ein politikur og ásetingar kunnu gerast.

Bræv

Ferðslutrygd fer fyrsta dagin at senda álitið við einum brævi til landsstýrismannin Bjarna Djurholm, ið hevur økið undir hond.

Ráðið fyri ferðslutrygd vónar við hesum, at ein nýggjur ferðslupolitikkur fer at spyrjast burturúr.

Aðalfundurin góðkendi eisini roknskapin hjá Ráðnum. Fíggingina til virksemið fær Ráðið fyri ferðslutrygd frá landinum, tryggingarfeløgum og kommununum umframt.

Ráðið fyri ferðslutrygd leggur stóran dent á upplýsandi arbeiði fyri skúlaungdóm, og nýggi formaðurin ynskir at fáa eina størri játtan fyri at kunna veita enn betri kunning.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra dóttir og mamma okkara

Agnas Hansina Poulsen
Tórshavn

andaðist í heiminum 22. apríl 27 ára gomul.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 25. apríl kl. 13.00 úr Ebenezer.

Familjunnar vegna
Gunnvør og Johannes
Anita, Amanda og Peter Poulsen

---

†

Kunngjørt verður, at kæra kona mín og mamma okkara

Thomasia Samuelsen
vanliga nevnd **Masa**

andaðist á Landssjúkrahúsinum tann 22. apríl 2003. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin tann 26. apríl kl. 15.00.

Hans, Manne og Kenn

---

†

Ann Thomsen

dóttir Hilde og Danjal Jacob Thomsen úr Sumba, búsitandi í Hvidovre, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 23. apríl, 28 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

Guðrun Jacobsen fer at syngja fyri suðuroyingum

Suðuroyingar hava fingið fyrsta rætt til at sleppa á konsertina hjá Guðruni Jacobsen í Havn, sunnukvøldið 11. mai. Smyril broytir sigligina so at hon passar til konsertina

KONSERT
Áki Bertholdsen

Guðrun Sólja Jacobsen fer at hava tríggjar konsertir í Føroyum í næsta mánað. Tann eina konsertin verður ein serligt suðuroyarkonsert

Suðuroy: Í næsta mánaða kemur nýtendraða stjørnan, Guðrun Sólja Jacobsen, til Føroya at halda tríggjar konsertir, saman við tveimum øðrum finalistum í Stjerne for en aften.

Tað eru teir báðir, Jacob Andersen og Martin Petersen, sum koma við Guðruni til Føroyar.

Men hóast allar tríggjar konsertirnar verða norðanfyri, fer tað at liggja væl fyri hjá suðuroyingum at hoyra oyggjarbarnið syngja, tí tann eina konsertin er nevniliga serliga ætlað suðuroyingum.

Tað er á konsertini í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið 11. mai, at suðuroyingar hava eitt gott høvi at fáa atgongumerki.

Útvarpið hevur lýst, at uppselt er til hesa konsertina.

Men tað er ikki allur sannleikin.

Orsøkin til, at atgongumerkini eru uppi, er tí, at Suðuroyar Kunningarstova hevur keypt tey allarflestu av teimum og tey eru nú at fáa til keyps á kunningarstovuni á Tvøroyri.

Í hesum sambandi hevur eisini Strandferðslan játtað at broyta ferðaætlanina hjá Smyrli so at hann siglur í sambandi við konsertina.

Sostatt siglur Smyril til Havnar sunnudagin 11. mai kl. 17 og er í Havn kl. 19.15.

Konsertin er kl. 20 sunnukvøldið og so siglur Smyril suður aftur av Havnini til Tvøroyrar kl. 22.

Atgongumerkini kosta 195 krónur og kunningarstovan sigur, at tað er gravgangur eftir teimum. Norðurlandahúsið er ikki so stórt, so tey, sum ætlað sær atgongumerki, skulu bera skjótt at.

Tað ber eisini til at bíleggja sær atgongumerki á kunningarstovuni í Havn.

Og av tí at tað er so stórur áhugi fyri at hoyra Gurðuna, verður eykakonsert í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið kl. 22, beint aftaná "suðuroyarkonsertina".

Annars fara tey trý úr Stjerne for en aften at hava konsert í mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 10. mai.

Orkestrið, sum tey hava við sær, er eitt serligt konsertorkestur, sum hevur ferðast við nýggju stjørnunum á umfatandi konsertferðini, sum júst hevur verið í Danmark.

Men á konsertunum í Føroyum fer eisini Brandur Enni at vera gestasangari.

Fleiri ung í Amnesty

Amnesty International Føroya deild hevði aðalfund herfyri

AMNESTY
Heri á Rógvi

18. apríl hevði Amnesty International Føroya deild aðalfund. Felagsskapurin, sum arbeiðir fyri mannarættindum kring allan heim, hevur eisini nógvar limir í Føroyum.

Í ársfrágreiðingini skrivar Annika Sølvará, forkvinna, at um sekshundrað limir eru í Amnesty International Føroya deild í løtuni.

– Tað sær út sum at limatalið kvinkast uppeftir aftur í løtuni, okkurt av tiltøkunum hevur fingið fleiri yngri fólk at melda seg í felagið, sigur Annika Sølvará í ársfrágreiðingini.

Forkvinna fegnast eisini um, at felagið hevur fingið góða umrøðu í fjølmiðlunum, og hann heldur, at hetta fyri at gera mun.

Arbeiðið hjá føroyska partinum av Amnesty heldur fram óbroytt til frama fyri mannarættindum kring allan heim.

Nýggj nevnd varð eisini vald á fundinum. Nevndin er nú mannað við hesum fólkum: Annika Sølvará, forkvinna, Jette Hoydal, næstforkvinna, Erling Isholm, kassameistari, Anna Maria Persson og Áki Johansen, nevndarlimir. Tiltakslimir eru Jórun Arge og Roar Olsen. Skrivari hjá felagnum er Fríði B. Nielsen.

Annika Sølvará heldur fram sum forkvinna í Amnesty International Føroya deild.

Mynd: Jens Kristian Vang.

SUZUKI LIANA 1,6
Ein rúmligur familjubílur við nógvari útgerð, so sum:
169.500,-
Aircondition
Alufelgur
Hiti í setrunum framman...
www.suzuki.fo
Spf. Eyðbjørn Hansen Bilasøla og Verkstaður
Varðagøta 75 • FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375 • Fax 31 14 95
Heimasíða: www.suzuki.fo • E-mail: suzuki@suzuki.fo • Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10

Snarferð til Billund
- við flogfari og gisting
í 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn
MAERSK AIR
It's got to be perfect